Eitt vælaverk

Fløgan Vágðaverk, stavað við bæði g og ð, kom á marknaðin fyri nøkrum vikum síðani. Tveir garvaðir tónleikarar úr Vágoynni standa aftanfyri og tað hoyrist — bæði at teir eru garvaðir og at teir eru vágamenn

TÓNLEIKAUMRØÐA
Dagfinn Olsen

Teir báðar Jóan Jakku Guttesen og Sámal Ravnsfjall kenna tey flestu frá ymsum varðum, teir hava sett sær í føroysku tónleikasøguni. Jóan Jakku m.a. frá Tinganest og egnari fløgu, og Sámal kenna vit í ymsum høpi, ikki minst frá samstarvinum við Ronnie Nielsen.

Jóan Jakku eigur sín stóra lut í uppfinningini av serstaka "vágasoundinum", sum serliga Tinganest kom við. Nakað, ið hevur merkt stóran part av nýggjara tónleikinum úr Vágoynni síðani, bæði har manning úr Tinganest hevur verið við, og har yngri kreftir hava tikið yvir.

Sámal er millum fremstu fólkatónleikarar okkara og heldur ikki hann kann heilt lúgva seg frá sínum uppruna, og hví skuldi nakar eisini funnið upp á tað?

Heitið Vágðaverk, har frítt val er millum ð og g, er væl funnið. Júst hvat teir báðir hava hugsað, er ilt hjá øðrum at vita, men at hetta er eitt vágaverk við g, tað ivast eingin í, sum lurtar, soundið er har og vágamálið, dialektin, verður ikki fjald. Og so tað, at tað í sær sjálvum at geva út eina fløgu altíð er eitt váðaverk við ð, er púra klárt. Fíggjarliga melur neyvan runt og so leggur ein eitt avrik fram til onnur at døma um, og dómur kann verða harður ella mildur, ilt at siga frammanundan.

Swinga fólkaligt

Talan er um bland av fólkatónleiki og rocki. Løgini eru javnt góð. Væl swingar í støðum. Stuttligt er, at teksturin tykist rættuliga fáa innivist. Tykist at viga nógv í samlaða verkinum. Fólkatónleiki líkt.

Og á tekstsíðuni er talan um bæði gaman og álvara. Serliga eru tað tekstirnir, sum Finnbjørn Hansen hevur skrivað, og sum Sámal hevur sett løg til, sum standa fyri tí skemtiliga. Best kendur er óivað Medistari í Karry, men eisini Trappan hjá Lenu er verd at seta seg á eina løtu og so er bert at lata seg undirhalda.

Folk/rock-eyðkennið verður undirstrikað av ymsum ljóðførum, t.d. violinini, sum eg havi frætt kom upp í leikin av tilvild, men sum avgjørt setur dám á dámliga verkið.

Vælaverk

Jú, her er talan um eitt vágaverk/váðaverk. Líkamikið, hvussu ein so hevur hug at venda hesum.

Men samstundis er talan um eitt vælaverk.

Teir duga sítt. Hvørgin teirra er heimsins besti sangari, men hinvegin hevði fáur klárað at gjørt teimum verkið eftir. Og tað er har, ið ein skal leita. Teir báðir gera tað teir gera, tað teir duga best, og sum bert teir duga, tí eingin kann gera tað júst sum teir. Teir seta síni merki á verkið, lurtarin ivast onga løtu. Teir eru tað teir eru og ikki so so ræðuliga nógv annað, og tað er fínt!

Og væl er frágingið í hesum tvíleikinum í føroyskum tónleiki. Skal ein fara upp at flákra, so eru løtur, at fólksligar samanrenningar sum Afzelius og Wihe kom til hugs.

Eisini nøvnini, ið koma aftaná teir báðar Samál og Jóan Jakku, borga fyri góðsku. Leivur Thomsen leikar guitar, Rógvi á Rógvu trummur, Jón McBirnie Bass, Jane Clark violin, Róin Siggertsson digderydoo, og Unn Patursson og Kim Hansen syngja kór. Terji Rasmussen leikar kassaguitar og upptøkurnar eru eisini farnar fram hjá honum í Sightseeing í Keypmannahavn og í Nólsoy veturin 2001/0002.

Finnur Hansen mastraði og Annika B. Mortensen gjørdi húsan og eigur myndir, og tað eigur Anker Mortensen eisini.

Málteigurin

steyp og frost

Yrkjarar kunnu stundum taka sær loyvi til at broyta orð eftir besta tykki, so at tey hóska betur í ørindislagið. Hetta verður nevnt skaldaloyvi, licentia poetica á latíni. Harvið er ikki sagt, at hesar broytingar eiga at verða toldar í vanliga máli okkara, men tað, ið soleiðis verður sett í ørindi, og sum ofta verður tikið til, er argt at smitta av. Janus sigur í kendari yrking: "Tømdir eru steypar allir" - og hvussu ofta hoyrist ikki hetta orðsnið í ítrótta-tíðindum! Men tað er og verður ikki beint fyri tað. Steyp er hvørkikynsorð: eitt steyp, fleiri steyp.

Í jólasongi eftir Kristin í Geil stendur: "frosturin bítur". Tó at hetta verður dúgliga sungið, munnu fá tó í royndum lata frost vera annað enn tað hvørkikynsorð, tað altíð hevur verið. Men onkur mundi stúrsa við av at síggja hetta í sjónvarpsteksti í juli í fjør: "Frostur er komin í". Hetta er vónandi ikki annað enn tað undantakið, ið prógvar regluna!

fara fyri skeytið

Síðsta orðið í hesum orðafelli verður ofta stavsett við ongum ð'i: fara fyri "skeyti". Tað fær ikki verið beint, tí hjá Svabo finna vit orðafellið í sniðinum: ganga fyri skeyt. - Síðsta orðið í tí sniði, ið nú verður mest nýtt, fær tí ikki verið annað enn bundin formur av orðinum skeyt og ikki eitt óbundið orð "skeyti". Tí verður mælt til at stavseta hetta nógv nýtta orðafelli soleiðis, sum í yvirskriftini stendur.

Orðafar nr. 9, februar 1988, 2. árg.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

TELDUBRÆVIÐ

Frá: Halla Nolsøe Poulsen, Washington, fittahalla@hotmail.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

Washington – hendingaríkur býur

Eg havi hoyrt, at Washington DC er valdsdepilin í heiminum. Tað er jú her, at heimsins maktmiklasti maður, Bush forseti, situr og hálar í snórar og stýrir tí heila, siga tey. Um so er, skal eg lata verða ósagt, men hendingaríkt er hetta umhvørvið í hvørt fall.

Í hesum døgum snýr alt kjakið seg um, hvørt USA skal leypa á Irak ella ikki, um USA skal leypa á Irak óansæð um ST stuðlar ella ikki, og um hesar krígsætlanir hava nakað við innanríkispolitikkin hjá stjórnini at gera. Tað er eyðsæð, at kríggj kastar vinning av sær, tí heimamarknaðurin skal tilbúgva tjóðina til at fara í kríggj, og hetta merkir betri tíðir fyri landsins búskap, ið ikki er so sterkur fyri tíðina. Funnist hevur verið at forsetanum í seinastuni fyri bert at tala um kríggið, og ikki geva landsins búskapi pláss í talunum, og tølini vísa eisini, at soleiðis er. Fjølmiðlarnir fylgja so væl við, at teir sita og taka tíð yvir, hvussu leingi forsetin talar um tey ymisku tingini, og hetta gevur teimum so eina ábending um, hvar høvuðsdenturin hjá forsetanum liggur. Og beint nú er tað so Irak. Hetta er eitt sindur í kontrast til, at ein kanning júst hevur víst, at fleiri og fleiri amerikanarar liva í fátækradømi. Samanborið við í síðsta ár er talið hækkað frá 11,3 til 11,7 prosent, til at tað nu eru 32,9 mió. ið liva í fátækradømi. Definitiónin uppá fátækradømi er í hesum føri, at eitt húski, maður og kona, tilsamans hava uml. 7.000 krónur at liva fyri um mánaðin. Tí eru atfinningarnar hjá andstøðuni um prioriteringarnar hjá forsetanum kanska ikki heilt av leið.

Í samband við starv mítt hevði eg herfyri høvi at vitja eina risa radiostøð her í DC. Hon kallast XM-radio og er tann største í heiminum, sambært teimum sjálvum. Tað skal ikki undra meg, tí har vóru 85 studio, ið øll kundu senda live nær sum helst og alla tíðina. Hon dekkar alt Norðuramerika, og eisini Hawaii. Grundarlagið fyri hesi risa privatfyritøku er, at fólk gjalda eitt fast mánaðargjald, og kunnu so móttaka allar tær 101 kanalirnar við einum serligum móttakara, ið tey fáa útflýggja. Mánaðargjaldið er ikki serliga høgt, einans 10 dollarir, uml. 75-80 krónur. So kunnu tey eisini velja ímillum, at hoyra bert country, bert rock, bert opera, bert 50'ara, 60'ara, 70'ara, 80'ara ella 90'ara tónleik allan dagin, ella hvat við at slappa av eitt vikuskifti við at hoyra ALLAR upptøkurnar við Frank Sinatra, ið nakrantíð eru gjørdar, frá A Baby Just Like You til Zing Went the Strings of My Heart? Ein onnur kanal sendir bara tónleik frá sokallaðum "garage-bands", tvs. orkestur, ið enn ikki hava nakran plátusáttmála. Beinan-vegin hetta hendir, verða tey ikki longur spæld á tí kanalini. Ljóðið verður sent digitalt, soleiðis at tað vanliga "knasið" á fm og am slepst undan, og hetta eru lurtarirnir sera fegnir um. Spennandi var at ganga runt inni har, og síggja øll studio'ini. Sjálvt um tey flestu vóru eins, so høvdu teir flestu útvarpsvertirnir pynta "sítt" studio, soleiðis at tað passaði til, hvat slag av tónleiki júst hann sendi. T.d. var Heavy Metal studio'ið tildekka við deydningahøvdum og svørtum stearinljósum, meðan onnur kanska mest líktust eini kirkju ella eini strond í caribiska havinum. Hjartað í tí heila — Control Center — líktist mest av øllum eini rúmdarstøð. Rættiliga imponerandi.

Fríggjadagur er í dag, og øll bíða í spenningi eftir, hvussu mótmælisgongurnar móti IMF og Heimsbankanum fara at spæla av. Fundir eru í dag og morgin, og boðað er frá, at mótmælisfólkini fara at avbyrgja allar høvuðsvegirnar í býnum, fyri at steðga ferðsluni. Politiið hevur mælt fólki frá at koyra inn í býin í dag, men hóast hetta er ferðslan stór, so tað verður nokk rokasligt hóast alt. Sum eg segði, hendingaríkur býur...

Sethús til sølu

Vegna Føroya Skiftirætt lýsa vit ognina Áargeil 13 B, Tórshavn, til sølu.

Húsini eru bygd uml. 1980. Húsini, sum eru onnur helvtin av einum dupulthúsum, liggja í Áargeil 13, Tórshavn og hava kjallara, miðhædd og loft.

Húsini eru eini timburhús í trimum hæddum, hvør hæddin 56 m². Takið er úr aluminium. Húsini verða upphitað við miðstøðuhita.

Grundøkið er til víddar 288 m².

Sethúsini liggja centralt fyri og hava gott útsýni yvir Havnina, serliga av loftinum, og liggja út til Vestara Ringveg.

Skiftirætturin tilskilar sær rætt at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til Christian Andreasen, adv.

Advokatskrivstovuna
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Kassafólk til Svimjihøllina

Søkt verður eftir kassafólki til Svimjihøllina í Tórshavn

Vit ynskja
at umsøkjarin er fryntligur, fyrikomandi og kann samstarva við onnur

Setanarviðurskifti
Talan er um fulltíðarstarv, ið er skipað í vaktum. Starvið verður sett sum skjótast. Løn sambært sáttmálum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita
um starvið við at venda sær til Elera Olsen, svimjihallarleiðara, tlf. 31 15 50 ella Jákup Simonsen deildarleiðara á Mentamáladeildini tlf. 31 51 60

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 14. oktober. Viðmerk "Kassafólk" á umsóknina

SNARSKIVAN

Sosialurin

HAVSBRÚN

TELEFON- & FAXNUMMUR

Vit skulu gera vart við, at vit hava hesi telefon- og faxnummur:

Mjøldeildin:	Tlf.:	41 44 00
	Fax:	41 44 01
Fóðurdeildin:	Tlf.:	41 44 60
	Fax:	41 44 61

Tey gomlu tlf. nr. svara ikki meira

www.havsbrun.fo
Box 81 · FO-530 Fuglafjørður · havsbrun@havsbrun.fo

PIAGGIO SERVICE CENTER
Úrvalsbilar Spf.
530 Fuglafjørður
tel. 444943 · fax 444638

Keypssamtøkan í Hoyvík

søkir fólk til at passa frystidiskarnar og annað fyrifallandi, fulla tíð, at byrja skjótast gjørligt. Løn sambært S&K.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Bent Lundsgaard, tlf. 31 41 49.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

FK Hoyvík
boks 349 · 188 Hoyvík
Att.: Bent Lundsgaard

GSM telefonir
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic
Tráðleysar
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast
Til skip og bátar
NMT 450 - VHF telefonir v.m.
Storno SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

Volvo FL 1D Chassis

árg. 88, í góðum standi, bíliga til sølu.

Ivan Johansen Bilar
Hoyvíksvegur 63 · Tlf. 313666